# stabarn
# g Jakarta



*Landsstýrið hevur gjørt av at senda Jan á Argjaboða og Bjørghild Djurhuus til Indonesia, har tey skulu arbeiða fyri altjóða hjálparfelagsskapin Mercy Corps í áleið ein mánað*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



## Fakta

**Indonesia**

| | |
|---|---|
| Vídd 1.000 km² | 1.812 |
| Fólkatal mió. | 217,6 |
| Partur av fólkinum, í býnum, % | 47 |
| Væntaður livialdur, ár | 67 |
| HIV-smittað av 15-49 ára gomlum, % | 0,1 |
| Barnadeyði, promillu | 38 |
| BNI pr. indb. US$ | 1.140 |
| BNI pr. indb. PPP$ | 3.485 |
| Atgongd til reint vatn, úti á landinum, %. | 69 |
| $CO_2$-útlát pr. Íbúgva, tons | 1,4 |

Kelda: Tøl um heimsins lond frá heimsbankanum, 2006

skaðilig fyri einstaka barnið, sigur Bjørghild. Og hon avdúkar, at sum heilsusystir er tað í báðum førum kynstrið at hoyra tað ósagda.

Og Jan leggur afturat:

- Uppgávan verður at koma ammustovusøgum til lívs. Eitt nú fáa lokalu ljósmøðurnar prosentir av hvørjum blikki av pulvurmjólk, sum tær selja møðrunum. Hetta kann hava óbótaligar avleiðingar fyri barnið og familjuna, tí vatnið er ofta dálkað, umframt at familjan brúkar frammanundan lítla peningin til nakað, sum kundi verið ókeypis. Jan skal vera frágreiðslufólk á ferðini, har hann skal skriva eina frágreiðing um støðuna á økinum, umframt eina niðurstøðu við tilmælum aftaná.

### Vatnflóð seinkaði

Ætlanin er, at tey vera burtur í ein mánað ella so. Arbeiðið úti á staðnum fer at fevna um at gera forkanningar og verkætlanarlýsing, har tey kunna seg um heilsuverkið í Indonesia og savna upplýsingar um trupulleikan við bróstageving. Síðani skulu tey greina upplýsingarnar, skriva frágreiðing og leggja úrslitini fram fyri myndugleikunum.

Av tí at ógvusligt áarføri og yvirflóð hevur verið í landinum seinastu vikurnar, er ferðin útsett í einar tvær vikur. Men nú hava tey fingið boð um, at farið verður úr Føroyum næsta fríggjadag.

### Bodnar til Mekka

Tey greiða frá, at hugburðurin hjá nógvum kvinnum er, at pulvurmjólk er betur enn móðurmjólk.

- Hesin hugburður verður stuðlaður av multinationalum fyritøkum, sum selja pulvurmjólk. Eitt nú verða ljósmøðurnar, sum selja mjólkina, bodnar ferðir til Mekka, um tær megna at økja um søluna av pulvurmjólk, sigur Jan á Argjaboða.

At mæla kvinnum til at geva bróst í eitt hálvt ár, hevur verði siðvenja í Føroyum í nógv ár.

- Tað stuttliga er, at vit hava mælt til hetta í nógv fleiri ár enn til dømis danir. Tað er ein myta, at tað ikki er nóg mikið hjá barninum bara at fáa bróstamjólk. Og ongin ivi er um nær barnið mungar eftir fastari føði, sigur Bjørghild, sum vónar at hon sleppur út at hitta mammurnar og pinkubørnunum í býlingunum.

- Tey eru muslimar. So tað er eisini áhugavert at fáa innlit í, hvussu mentanin er viðvíkjandi tí at geva bróst – um tað er loyvt at geva alment, um tær hava farloyvi, og annars, hvat tey vita um tað, sigur Bjørghild. Og hon endar samrøðuna við at staðfesta:

- Ein familja í Indonesia, sum gevur pulvurmjólk, rindar 200 dollarar fyri pulvur í eitt hálvt ár. Hetta svarar til tvær og eina hálva mánaðarløn. Vit bjóða teimum eitt ókeypis alternativ, so vit áleggja teimum ongar útreiðslur, heldur tvørturímóti. Tí alt talar fyri at geva bróst so leingi, sum til ber.